# Nyggj djóralæknaviðtala í Havn

TÍÐINDASKRIV

Ein nýggj djóralæknaviðtala verður nú í Havn. Lars Mohr Nielsen, djóralækni hevur í Stoffalág 31 latið upp djóralæknuviðtalu.

Hann fer at hava viðtalu fyri landbúnaðinum og hevur herumframt latið upp praksis við atliti til at viðgera onnur djór, við gerst ein alsamt størri partur av arbeiðinum hjá djóralæknum. Lars fer at lutaka í vaktarskipanum, eftir tí nýggju avtaluni millum Landsdjóralæknan og privatpraksiserandi djóralæknar.

Lars Mohr Nielsen er útbúgvin djóralækni frá Landbúnaðarháskúlanum í Keypmannahavn í 1990. Eftið lokið prógv arbeiddi hann eitt ár á Fiskasjúkudeildin hjá Landsdjóralæknanum.

Arbeiddi síðani 2 1/2 ár í praksis ymsa staðini í Jyllandi.

Kom eftir hetta heimaftur, var aftur á Fiskasjúkadeildini og síðani í uml. 3 ár hjá Djóralæknatanastuni.

Lars fór hereftir í undirvísingar og granskingarstarv á Klinisk Institutî á Landbúnaðarháskúlanum og var hann her í 2 1/2 ár.

Tey seinastu árini hevur hann starvast á Dansk Veterinerinstitut og m.a. luttikið í tí stóru kanningini av smittandi sjúkum í Føroyum við Landsdjóralæknin hevur sett í verk seinastu árini.

Hevur í hesum tíðarskeiðið verið avloysari á djóraklinikk uttanfyri Keypmannahavn og í Føroyum. Og fyri einum hálvum ári síðani luttikið í arbeiðnum til varðveitan av tí serstaka føroyska rossaslagnum.

Áhugað eru vælkomin at seta seg í samband við Lars Mohr Nielsen á tlf. 311041 ella 511041.

Hava tygum tørv á einum bili í nakrar tímar, dagar ella longur,
er skilagott at leiga, heldur enn eiga!
Setið tygum í samband við okkum,
- tað loysir seg!!
AVIS BILÚTLEIGAN
Staravegur 1, Tórshavn, tlf. 217 535 / 313 535
Flogvøllurin: tlf. 212 765 /358 800
Teldupostur: avis@post.olivant.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Åge Olsen**
Trongisvágur

andaðist og bleiv jarðaður.

Takk fyri vitjanir, heilsanir, gávur, blómur og kransar.
Takk til Jósvein Bech, prest, kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk til tykkum, sum hjálptu til jarðarferðina.

Tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Anna, Egil, Annika og Jan**

Snarferð
til Billund
- við flogfari og gisting
I 2 nætur í Billund
frá kr. 2.185* t/r fyri hvønn
MAERSK AIR
It's get to be perfect

*Klaksvík er ein parabolbýur burturav, og tað ljóðaði ofta, áðrenn Televarpið kom norðurum, at tað fór at verða til fánýtis, men tey orðini vórðu gjørd til skammar týsdagin, fyrsta dagin hjá Televarpinum í Klaksvík*
*Mynd: Jan Müller*

# Parabolbýur tók væl ímóti Televarpinum

**Televarpið er nú byrjað at senda í Klaksvík, og hóast Klaksvík má sigast, at vera ein parabolbýur burturav, so blivu rættuliga nógvir móttakarar frá Televarpinum seldir í Klaksvík týsdagin**

TELEVARPIÐ
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Televarpið hevði køtilboð upp á sínar móttakarar týsmorgunin 1. apríl, tá tað byrjaði at senda í Klaksvík. Undirtøkan var avbera góð, og einir 85 ella 90 móttakarar vórðu seldir í teimum trimum sølubúðunum, har teir vóru at fáa. Tað ljóðar kanska ikki av so nógvum, men tað má metast at vera avbera gott, tí so gott sum hvørt hús í Klaksvík hevur parabolskipan.

Men tað letur sostatt til, at klaksvíkingar og norðoyingar annars eru við at troyttast av teimum stóru tallerkunum, sum mugu hanga ella standa uttanfyri teirra hús, um tey skulu síggja annað enn Sjónvarp Føroya. Tað sást á sølutølunum hjá Televarpinum henda dagin.

Pól Sundsskarð, leiðari í Telebúðini í Klaksvík, sum var ein av trimum sølubúðum týsdagin, er púra ovfarin av undirtøkuni.

– Tað var ikki væntandi, at undirtøkan fór at vera so góð í einum parabolbýi, sum Klaksvík er, men tað frøast vit so sanniliga um, sigur hann.

Tá Televarpið av fyrstan tíð byrjaði at senda í høvuðsstaðnum, rendi tey seg í eina ørgrynnu av byrjunartrupulleikum, men tað hevur ikki verið nakar trupulleiki í Klaksvík.

– Fólk hava frá fyrstan tíð fingið at vita, at um tey vilja síggja Televarpið, so mugu tey keypa eina nýggja antennu, og tað hevur óivað gjørt sítt til, at ongin klaga er komin hesar fyrstu dagarnar, heldur Pól Sundsskarð.

Hann heldur fram, at viðskiftafólk fingu kassan kláran heim við. Tað vil siga, at tey innlósu allar rásirnar í sølubúðini, áðrenn fólk fingu kassan heim við. So tað einasta teimum nýttist at gera, var at seta antennuna upp og so stikkið í, so kundu tey síggja Televarpið.

Spurdur um, hví hann heldur, at undirtøkan var so góð, sigur Pól, at tað kann væl vera, at fólk eru við at troyttast av parabolunum, og fleiri at teimum kunnu eisini vera nógv slitinir nú, tí tað eru nú vorðin nøkur ár síðani, at parabol sást á so gott sum hvørjum húsaveggi í Klaksvík.

Um góða undirtøkan hjá Televarpinum fer at halda fram, tað fer at síggjast teir komandi dagarnar.

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE
Skeið á KVASIR
Kom á skeið
í Adobe PhotoShop
KVASIR bjóðar skeið bæði til teirra, ið hava lítlan ella ongan kunnleika til PhotoShop, og til teirra, ið ynskja viðkaða vitan innan myndaviðgerð.
Viðkað skeið í Adobe Photoshop 7.0
3 x kl 08:30-15:30: 22/04 + 02/05 + 13/05
Myndaviðgerð við Adobe Photoshop 7.0
3 x kl 08:30-15:30: 25/04 + 09/05 + 23/05
Scanning og eftirviðgerð
1 x kl 08:30-15:30: 06/05
Vit veita eisini tilboð uppá sokallaði "firmaskeið", um áhugi skuldi verið fyri ti
Tel 320 204
http://kvasir.fo